


# Faroe Petroleum tvey nýggj loyvi í Bretlandi

Deil:

**Jan Müller**

07.11.2014 - 12:56

Oljan.fo

Faroe Petroleum boðar frá, at felagið hevur fingið lutað tvey nýggj leitiloyvi á bretskum øki í sambandi við 28. útbjóðingarumfar.

Fynn - teigarnar 15/11 & 15/16d - Faroe 25%

Loyvið liggur í Norðsjónum, umleið 6 km frá Lowlander fundinum, sum Faroe er fyristøðufelag fyri. Verk- ætlanin fevnir um ein møguligan brunn, ið skal borast, og viðgerð av seismikki(“PDSM”). Tann møguligi brunnurin verður boraður, um úrslitið av seismisku viðgerðini er nøktandi.

Hini feløgini, sum luttaka í loyvinum, eru Parkmead (25% og fyristøðufelag), Verus Petroleum (25%) og CalEnergy Gas (25%).

Perth Field Extension – teigur 14/25 - Faroe 34,62%

Loyvið liggur beint vestanfyri Perth fundið. Verkætlanin fevnir um seismiska viðgerð ("PDSM"), áðrenn støðu verður tikin um at bora ein brunn ella lata loyvið innaftur.

Hini feløgini, sum luttaka í loyvinum eru DEO Petroleum, eitt dótturfelag hjá Parkmead (52,03% og fyristøðufelag) og Atlantic Petroleum UK (13,35%).

Graham Stewart, forstjóri sigur í viðmerking, at felagið er fegið um at boða frá nýggju loyvunum í Norðsjónum. At hava tryggjað sær hesi spennandi loyvini rundan um tann týdningarmikla Perth/Dolphin/Lowlander útbyggingarmøguleikan, har Faroe frammanundan hevur stóran part, váðaspjaðir enn meira á okkara stóru leitiportifølju